Eik

# Corporate Governance

EIK BANKI

‘14



# Frágreiðing um góða virkisleiðslu 2014

Finansráðið mælir øllum limum sínum til at viðgera allar tilráðingingar frá ”Komitéen for god Selskabsledelse”, og greiða frá um tilráðingarnar verða fylgdar ella ikki. Tilráðingarnar eru beinleiðis rættaðar til fyritøkur, ið eru skrásettar á einum keypsskála.

Eik Banki er ikki skrásettur og er tískil ikki beinleiðis umfataður av tilráðingunum, men Eik Banki fylgir nærum øllum tilráðingum, ið eru viðkomandi fyri ein peningastovn við bert tveimum partaeigarum. Summar av tilráðingunum er lógarkrav fyri peningastovnar at fylgja.

## INNIHALD


- 1. partur: Tilráðingarnar um góða virkisleiðslu
- 2. partur: Tilráðingarnar frá Finansráðnum

# 1. PARTUR

## TILRÁÐINGARNAR UM GÓÐA VIRKISLEIÐSLU

"Komiteén for god Selskabsledelse" hevur útgivið eina røð av tilráðingum um góða virkisleiðslu[1], sum eru at meta sum vegleiðingar, ið serliga børsskrásett feløg eiga at fylgja. Eik Banki er limur í Finansráðnum, ið mælir øllum limum sínum at fylgja tilráðingunum.

Mælt verður til, at feløg greiða frá um tey fylgja tilráðingunum ella ikki. Um ein tilráðing ikki verður fylgd, eigur felagið at greiða frá hvør orsøkin til frávikið er, og hvat felagið hevur valt at gera í staðin. Um eitt felag ikki fylgir einari tilráðing, er hetta ikki at meta sum brot á nakrar reglur, men bert at felagið hevur valt eina aðra loysn.

Eik Banki er ikki børsskrásettur og er tískil ikki fevndur av nøkrum kravi, ið sigur at bankin skal fylgja tilráðingum um góða virkisleiðslu. Av tí at Eik Banki er ein banki við bert tveimum eigarum eru tað ikki allar tilráðingarnar, ið eru viðkomandi fyri bankan, men Eik Banki fylgir nærum øllum tilráðingunum og hevur tískil valt at gera eina frágreiðing um hvørjar tilráðingar bankin fylgir, og um hvørji og hví frávík eru.

Felagið fylgir | Felagið fylgir lutvíst | Felagið fylgir ikki

## 1. FELAGSINS SAMSKIFTI OG SAMSPÆL VIÐ ÍLEGGJARAR OG AÐRAR INTERESSENTAR

### 1.1. SAMSKIFTI MILLUM FELAGIÐ, PARTAREIGARAR OG AÐRAR INTERESSENTAR

| | | |
|---|---|---|
| 1.1.1. | Mælt verður til, at nevndin tryggjar eitt støðugt samskifti millum felagið og partareigarar, soleiðis at partaeigararnir fáa viðkomandi innlit í felagsins møguleikar og politikkir, og at nevndin kennir hugburð, áhugamál og sjónarmið hjá partaeigarunum í sambandi við felagið. | Felagið fylgir<br><br>Felagið hevur tveir partaeigarar, TF Holding og Finansiel Stabilitet. Ognarparturin hjá TF Holding er 70 % og ognarparturin hjá Finansiel Stabilitet er 30 %. Millum partaeigarnar er gjørd ein eigaraavtala, ið er løgd fyri nevndina til kunningar. Nevnd felagsins hevur regluligt samskifti við báðar partaeigarnar. |
| 1.1.2. | Mælt verður til, at nevndin samtykkir politikkir viðvíkjandi felagsins viðurskiftum mótvegis interessentum, íroknað partaeigarar og aðrar íleggjarar. Nevndin skal eisini tryggja, at áhugamálini hjá interessentunum verða vird í samsvari við viðkomandi politikkir hjá felagnum. | Felagið fylgir<br><br>Nevndin í felagnum hevur viðtikið ein samskiftispolitikk til m. a. at røkja viðurskiftini við eigarar, myndugleikar og onnur uttanhýsis áhugað. |
| 1.1.3. | Mælt verður til, at felagið almannakunnger ársfjórðingsfrágreiðingar. | Felagið fylgir ikki<br><br>Felagið hevur gjørt av ikki at almannakunngera roknskapirnar hvønn ársfjórðing av tí, at tað verður mett nøktandi at almannakunngera roknskapin hálvárliga og tá árið er liðugt, eins og lóggávan ásetur. |

[1] Tilráðingarnar eru at finna á corporategovernance.dk

### 1.2. AÐALFUNDURIN

| | | |
|---|---|---|
| 1.2.1. | Mælt verður til, at nevndin í fyrireikingunum til ársaðalfundin ber soleiðis í bandi, at eigararnir hava møguleika at gera sína ávirkan galdandi yvir fyri felagnum. | **Felagið fylgir**<br>Avgreiðslan av ársaðalfundinum verður løgd soleiðis til rættis, at partaeigararnir hava møguleika at taka lut á fundinum og gera sína ávirkan galdandi. Bankin fylgir aðalregluni um, at hvørt partabræv gevur somu atkvøðu. |
| 1.2.2. | Mælt verður til, at í fulltrúum, til nýtslu á aðalfundinum, verður givið partaeigarunum møguleika at taka støðu til hvørt einstakt punkt á dagskránni. | **Felagið fylgir**<br>Partaeigararnir í Eik Banka hava henda møguleika. |

### 1.3. YVIRTØKUROYND

| | | |
|---|---|---|
| 1.3.1. | Mælt verður til, at felagið setir tilbúgvingar-mannagongd fyri yvirtøkuroyndir. Tilbúgvingar-mannagongdin skal fevna um tíðarskeiðið frá tí at nevndin fær grundaðan illgruna um, at yvirtøkutilboð fer at verða givið. Mannagongdin eigur at áseta, at nevndin aftrar seg við at ganga yvirtøkutilboðnum á møti, uttan góðkenning frá aðalfundinum, við at taka avgerðir, sum í veruleikanum forða partaeigarunum í at taka støðu til yvirtøkuroyndina. | **Felagið fylgir**<br>Sambært viðtøkum felagsins kunnu partabrøvini ikki avhendast uttan við góðkenning frá aðalfundinum. |

## 2. UPPGÁVUR OG ÁBYRGD HJÁ NEVND

### 2.1. YVIRSKIPAÐAR UPPGÁVUR OG ÁBYRGD

| | | |
|---|---|---|
| 2.1.1. | Mælt verður til, at nevndin í minsta lagi árliga viðger tey viðurskifti, ið eru partur av teimum uppgávum, ið nevndin skal røkja. | **Felagið fylgir**<br>Nevndin samtykkir árliga eina yvirskipaða arbeiðsætlan fyri komandi ári. Starvsskipanin fyri nevndina verður leypandi dagførd og gjøgnumgingin minst einaferð um árið. |
| 2.1.2. | Mælt verður til, at nevndin í minsta lagi árliga tekur støðu til felagsins yvirskipaðu strategi, við tí í hyggju at tryggja virðisskapanina í felagnum. | **Felagið fylgir**<br>Nevndin viðger árliga strategi felagsins. Um neyðugt, verða tillagingar gjørdar eftir teimum kørmum, felagið arbeiðir undir. |
| 2.1.3. | Mælt verður til, at nevndin sær til, at felagið hevur ein kapital og partabrævabygnað, sum stuðlar undir at felagsins strategi og langtíðar virðisskapan eru í tráð við áhugamálini hjá partaeigarunum og felagnum. Harumframt greiðir frá hesum í leiðslufrágreiðingini í ársfrásøgnini hjá felagnum og/ella á felagsins heimasíðu. | **Felagið fylgir**<br>Nevndin viðger javnan kapitalbygnað felagsins. Í ársfrásøgnini verður kapitalbygnaðurin umrøddur, harumframt verður hesin neyvari viðgjørdur í váðafrágreiðingini hjá felagnum. Váðafrágreiðingin er tøk á heimasíðu felagsins. |

| | | |
|---|---|---|
| 2.1.4. | Mælt verður til, at nevndin árliga gjøgnumgongur og góðkennir reglugerð fyri stjórn, og undir hesum staðfestir krøv til stjórn um rættstundis, neyvt og nøktandi at geva frágreiðing til nevndina. | **Felagið fylgir**<br>Bankin fylgir tilráðingini. |
| 2.1.5. | Mælt verður til, at nevndin í minsta lagi árliga umrøður samanseting og menning, váðar og succesionsætlanir fyri stjórnina. | **Felagið fylgir**<br>Bankin fylgir tilráðingini. |
| 2.1.6. | Mælt verður til, at nevndin árliga umrøður virksemi felagsins fyri at tryggja at felagið hevur eitt viðkomandi fjølbroytni í felagsins leiðslustigum, og undir hesum ásetir ítøkilig mál í leiðslufrágreiðingini í ársfrásøgnini hjá felagnum og/ella á heimasíðuni hjá felagnum greiðir frá sínum málsetningum og støðuni, um málsetningarnir vera hildnir. | **Felagið fylgir ikki**<br>Bankin fylgir ikki í løtuni tilráðingini, men fer í 2015 at orða ein politikk á økinum. |

## 2.2. SAMFELAGSÁBYRGD (CORPORATE SOCIAL RESPONSIBILITY)

| | | |
|---|---|---|
| 2.2. | Mælt verður til, at nevndin samtykkir politikkir fyri samfelagsábyrgd felagsins. | **Felagið fylgir ikki**<br>Nevndin hevur í løtuni ikki viðtikið nakran formligan politikk fyri samfelagsábyrgd bankans, men arbeitt verður við hesum. |

## 2.3. FORMAÐURIN OG NÆSTFORMAÐURIN Í NEVNDINI

| | | |
|---|---|---|
| 2.3.1. | Mælt verður til, at næstformaður verður valdur í nevndina, sum virkar fyri formannin, skuldi hesin fingið forfall og annars virkar sum ein góður sparringspartnari hjá formanninum. | **Felagið fylgir**<br>Nevndin hevur skipað seg við vali av bæði einum formanni og einum næstformanni. |
| 2.3.2. | Mælt verður til, at um nevndin hendingaferð biður nevndarformannin um at gera serligar uppgávur fyri felagið, herundir í stutt skeið at taka lut í dagligu leiðsluni, skal fyriliggja ein nevndaravgerð um hetta, við tí fyrivarni at tryggja, at nevndin varðveitir tað yvirskipaðu leiðsluna og eftirlitsskipanina. Avtalur um luttøku formansins í tí dagligu leiðsluni og um hvussu leingi luttøkan væntast at vara, skal verða fráboðað í fráboðan frá felagnum. | **Felagið fylgir**<br>Eik Banki fer at fylgja tilmælinum um so er at henda støða tekur seg upp. |

## 3. SAMANSETING OG SKIPAN AV NEVND

### 3.1. SAMANSETING

| | | |
|---|---|---|
| 3.1.1. | Mælt verður til, at nevndin árliga lýsir:<br><br>• hvørjar førleikar nevndin skal ráða yvir fyri best møguligt at kunna røkja sínar skyldur,<br>• samansetingina av nevndini, umframt<br>• serligu førleikunum hjá einstøku limunum. | **Felagið fylgir**<br><br>Nevndin metir leypandi um nevndin samanlagt hevur neyðugu vitanina og royndirnar viðvíkjandi váðum bankans fyri at tryggja, at bankin verður rikin skynsamiliga. |
| 3.1.2. | Mælt verður til, at nevndin tryggjar eina formliga, gjølla kannaða og fyri limirnar gjøgnumskygda mannagongd í sambandi við útveljing og tilmæli av umboðum í nevndina. Tá mett verður um samansetingina og tilmæling av nýggjum umboðum, skal takast atlit at tørvi fyri endurnýggjan og margfeldi í sambandi við millum annað altjóða royndir, kyn og aldur. | **Felagið fylgir ikki**<br><br>Tað er ikki gjørd nøkur skrivlig mannagongd í sambandi við val av nevndarlimum. |
| 3.1.3. | Mælt verður til, at tað saman við innkallingini til aðalfundin, har nevndarval er á skrá, umframt ásetingarnar í lóggávuni, verður send út ein lýsing av førleikunum hjá teimum uppstillaðu valevnunum og<br>• onnur leiðslustørv, undir hesum sessir í nevndum, stjórnum, eftirlitsráðum, í hesum leiðslunevnd í útlendskum fyritøkum,<br>• krevjandi fyriskipanaruppgávur, og at tað verður upplýst,<br>• um valevnini til nevndina verða mett sum óheft. | **Felagið fylgir ikki**<br><br>Bankin hevur tveir partaeigarar. Partaeigarnir eru vitandi um førleikarnar hjá teimum uppstillaðu nevndarlimunum eins og onnur leiðslustørv o. a. m. |
| 3.1.4. | Mælt verður til, at viðtøkur felagsins áseta eitt aldurmark fyri nevndarlimirnar. | **Felagið fylgir**<br><br>Viðtøkurnar hjá felagnum áseta, at nevndarlimir skulu fara úr nevndini á fyrsta vanliga aðalfundi eftir, at nevndarlimurin hevur fylt 70 ár.<br><br>Viðtøkurnar hjá bankanum eru tøkar á heimasíðu felagsins. Við samykki frá báðum partaeigarum felagsins er tó í ítøkiligum føri vikið frá aldursmarkinum. |
| 3.1.5. | Mælt verður til, at teir aðalfundarvaldu nevndarlimirnir standa fyri vali hvørt ár á tí regluliga aðalfundinum. | **Felagið fylgir**<br><br>Sambært viðtøkum felagsins standa allir aðalfundarvaldunevndarlimirnir fyri vali á hvørjum ári.<br><br>Viðtøkurnar hjá bankanum eru tøkar á heimasíðu felagsins. |

## 3.2. ÓHEFTNI HJÁ NEVNDINI

| | | |
|---|---|---|
| 3.2.1. | Mælt verður til, at í minsta lagi helvtin av aðalfundarvaldu nevndarlimunum eru óheftir, soleiðis at nevndin kann virka óheft av seráhugamálum. Fyri at vera óheftur, má viðkomandi ikki:<br>• vera ella innan seinastu 5 árini hava verið limur í stjórnini ella leiðandi starvsfólk í felagnum, einum dótturfelag ella einum assosieraðum felag,<br>• innan seinastu 5 árini hava móttikið størri samsýning frá felagnum/samtakinum, einum dótturfealg ella einum assosieraðum felag í øðrum eginleika enn limur í nevndini,<br>• umboða áhugamál hjá einum ráðandi partaeigara,<br>• innan seinasta árið hava havt eitt týðandi handilssamband (t.d. persónligt ella óbeinleiðis sum partnari ella starvsettur, partaeigari, kundi, veitari ella limur í leiðsluni á feløgum við líknandi sambondum) við felagið, eitt dótturfelag ella eitt assosierað felag,<br>• vera ella innan seinastu 3 árini hava verið starvsettur ella partnari hjá uttanhýsis grannskoðara,<br>• vera stjóri í einum felag, sum hevur tvørgangandi leiðsluumboðan við felagið,<br>• hava verið nevndarlimur í meiri enn 12 ár, ella<br>• vera í tøttum familjusambondum við persónar, sum ikki kunne metast at vera óheftir. | **Felagið fylgir**<br><br>Helvtin av aðalfundarvaldu nevndarlimunum eru óheftir.<br><br>Upplýsingar um óheftni ella vantandi óheftni hjá einstøku nevndarlimunum síggjast á teirra CV, sum sæst í ársfrásøgnini og á heimasíðu felagsins. |

## 3.3. NEVNDARLIMIR OG TAL AV ØÐRUM LEIÐSLUSTØRVUM

| | | |
|---|---|---|
| 3.3.1. | Mælt verður til, at hvør einstakur nevndarlimur metir um hvussu nógva tíð er neyðug at brúka upp á nevndararbeiði, soleiðis at viðkomandi ikki tekur á seg fleiri størv enn at hvørt einstakt starv kann gerast á ein nøktandi hátt fyri felagið. | **Felagið fylgir**<br><br>Eik Banki væntar, at nevndarlimirnir seta neyðuga tíð av til ein virknan leiklut í at skapa virði í nevndarstarvinum. Eik Banki almannakunngerð onnur størv hjá nevndarlimunum. |
| 3.3.2. | Mælt verður til, at leiðslufrágreiðingin, umframt ásetingarnar í lóggávuni, inniheldur hesar upplýsingarnar um nevndarlimirnar:<br>• arbeiði hjá viðkomandi,<br>• aldur og kyn hjá viðkomandi,<br>• um limurin verður mettur at vera óheftur,<br>• tíðspunkt tá nevndarlimurin kom inn í nevndina,<br>• nær galdandi valtíðarskeiðið gongur út,<br>• onnur leiðslustørv, undir hesum sessir í stjórnum, nevndum, eftirlitsráðum, í hesum leiðslunevndum í útlendskum feløgum, umframt<br>• krevjandi fyriskipanaruppgávur, og<br>• nøgd av partabrøvum, optiónum, warrants og líknandi í felagnum og tey, gjøgnum felagið knýttu samtaksfeløgum, sum nevndarlimurin eigur, og tær broytingar í virðisbrævagoymslu hjá nevndarliminum av nevndu virðisbrøvum, sum er farnar fram í roknskaparárinum. | **Felagið fylgir**<br><br>Ársfrásøgnin hjá felagnum hevur allar hesar upplýsingarnar um nevndarlimirnar. |

## 3.4. UNDIRNEVNDIR

| | | |
|---|---|---|
| 3.4.1. | Mælt verður til, at felagið á heimasíðu felagsins almannakunnger:<br>• arbeiðssetningar hjá undirnevndunum,<br>• høvuðsvirksemi hjá undirnevndunum í árinum og talið av fundum í hvørjari nevnd, umframt<br>• nøvnini á umboðunum í tí einstøku nevndini, undir hesum nevndarformenn og upplýsing um, hvørjir limir eru óheftir og hvørjir eru limir við serligum førleikum. | **Felagið fylgir**<br><br>Nevnd bankans útinnir eisini uppgávurnar sum grannskoðanarnevnd. Arbeiðssetningurin (kommisorium) er tøkur á heimasíðu felagsins.<br><br>Bankin hevur ikki aðrar undirnevndir. |
| 3.4.2. | Mælt verður til, at meirilutin av undirnevndarlimunum eru óheftir. | **Felagið fylgir ikki**<br><br>Helvtin av undirnevndarlimunum eru óheftir. |
| 3.4.3. | Mælt verður til, at nevndin setur eina grannskoðanarnevnd, sum er samansett soleiðis, at<br>• nevndarformaðurin er ikki formaður fyri grannskoðanarnevndina, og at<br>• grannskoðanarnevndin tilsamans hevur serkunnleika og royndir, at hon hevur eitt dagført innlit í og royndir við fíggjarviðurskiftum og roknskapar- og grannskoðanarviðurskiftum hjá feløgum, sum hava partabrøv teknað til handil á einum skipaðum marknaði. | **Felagið fylgir lutvíst**<br><br>Nevndin í felagnum hevur valt at lata nevndina í síni heild manna grannskoðanarnevndina. Hetta hevur nevndin valt at gera við heimild í kunngerð um grannskoðanarbólk. Soleiðis er nevndarformaðurin eisini formaður í grannskoðanarbólkinum. |
| 3.4.4. | Mælt verður til, at grannskoðanarnevndin, áðrenn góðkenning av ársfrágreiðingini og aðrari fíggjarfrágreiðing, hevur eftirlit við og gevur frágreiðing til nevndina um:<br>• nýttan roknskaparhátt á týðandi økjum,<br>• týðandi roknskaparligar metingar,<br>• handlar við nærstandandi partar, og<br>• óvissur og váðar, undir hesum eisini í samband við vánirnar fyri inniverandi ár. | **Felagið fylgir**<br><br>Setningurin (kommisorium) hjá grannskoðanarnevndini fevnir millum annað um tey nevndnu viðurskifti í tilmælinum. |
| 3.4.5. | Mælt verður til, at grannskoðanarnevndin:<br>• árliga metir um tørvin á eini innanhýsis grannskoðan, og um so er, kemur við tilráðing um útveljing, setan í starv, uppsøgn av leiðaranum í møguligari innanhýsis grannskoðan, og fíggjarætlanini hjá innanhýsis grannskoðanini, og<br>• hevur eftirlit við framhaldsviðgerðini hjá stjórnini viðvíkjandi niðurstøðum og tilmælum hjá innanhýsis grannskoðanini. | **Felagið fylgir**<br><br>Felagið skal sambært lóggávu hava innanhýsis grannskoðara. Óheftni, objektivitetur og førleikar hjá innanhýsis grannskoðara verða viðgjørd javnan av grannskoðaranevndini. |

| | | |
|---|---|---|
| 3.4.6. | Mælt verður til, at nevndin setur á stovn ein tilráðingarbólk, sum í minsta lagi hevur hesar fyrireikandi uppgávur:<br>• lýsir førleikarnar, sum eru neyðugir í nevndini og stjórnini og til eitt ávíst starv, og at áseta tíðina, tað verður mett skal setast av til at røkja starvið og eisini meta um førleikar, vitan og royndir, sum eru í teimum báðum leiðsluskipanunum,<br>• árliga meta um bygnaðin, støddina, samansetingina og úrslit hjá stjórn og nevndini og eisini geva tilráðing til nevndina um møguliga broytingar,<br>• árliga meta um førleikar, vitan og royndir hjá nevndarumboðunum og eisini geva nevndini frágreiðing um hetta,<br>• meta um uppskot frá viðkomandi persónum, íroknað partaeigarum og umboðum í nevndini og stjórnini, til nýggj valevni til nevndina og stjórnina, og<br>• seta fram uppskot til nevndina um eina virkisætlan um framtíðar samanseting av nevndini, íroknað uppskot til ítøkiligar broytingar. | **Felagið fylgir ikki**<br><br>Bankin hevur avgjørt, at tað er ikki neyðugt við einum slíkum tilráðingarbólki, sum er. |
| 3.4.7. | Mælt verður til, at nevndin setur á stovn ein tilráðingarbólk (lønarbólk), sum í minsta lagi hevur hesar fyrireikandi uppgávur:<br>• tilráða lønarpolitikkin, (undir hesum yvirskipaðar leiðreglur fyri avriksløn) fyri nevnd og stjórn til góðkenning av nevnd áðrenn hetta verður góðkent,<br>• seta fram uppskot til nevndina um samsýning til nevndarlimir og stjórn og at tryggja, at samsýningin er í tráð við lønarpolitikkin hjá felagnum og metingin av innsatsinum hjá viðkomandi. Bólkurin skal hava kunnleika um samlaðu samsýningina, sum nevndarlimir og stjórn fáa frá øðrum feløgum í samtakinum, og<br>• tilráða ein samsýningarpolitikk, sum alment er galdandi í felagnum. | **Felagið fylgir ikki**<br><br>Bankin hevur avgjørt, at tað er ikki neyðugt við einum slíkum tilráðingarbólki, sum er. |
| 3.4.8. | Mælt verður til, at tilráðingarbólkurin ikki brúkar somu uttanhýsis ráðgevarar sum stjórnin í felagnum. | **Felagið fylgir ikki**<br><br>Bankin hevur avgjørt, at tað er ikki neyðugt við einum slíkum tilráðingarbólki, sum er. |

## 3.5. EFTIRMETING AV ARBEIÐINUM Í NEVNDINI OG STJÓRNINI

| | | |
|---|---|---|
| 3.5.1. | Mælt verður til, at nevndin ger eina mannagongd fyri eftirmeting, sum metir íkastið og úrslitið hjá samlaðu nevndini og einstøku nevndarlimunum, umframt samstarvið við stjórnina. Týðandi broytingar avleiddar av hesari meting, eiga at verða upplýstar í leiðslufrágreiðingini ella á heimasíðuni hjá felagnum. | **Felagið fylgir**<br><br>Bankin fylgir tilráðingini. |

| | | |
|---|---|---|
| 3.5.2. | Mælt verður til, at nevndin í sambandi við fyrireikingarnar til aðalfundin metir um talið av nevndarlimum er hóskiligt í mun til tørvin hjá felagnum. Undir hesum skal tryggjast, at orðaskifti er dygdargott og avgerðartilgongdin er munadygg, so allir liminir hava møguleika at hava eina virkna luttøku. | **Felagið fylgir**<br><br>Sambært viðtøkunum skulu vera 3-6 aðalfundarvaldir nevndarlimir. Nevndin metir, sum er, at 6 nevndarlimir er eitt hóskandi tal. Harumframt hava starvsfólkini rætt at velja upp til 3 nevndarlimir, alt eftir talið av teimum aðalfundarvaldu nevndarlimunum. |
| 3.5.3. | Mælt verður til, at nevndin í minsta lagi árliga metir um arbeiðið og úrslitini hjá stjórnini sambært frammanundan ásettum greiðum fortreytum. | **Felagið fylgir**<br><br>Bankin fylgir tilráðingini. |
| 3.5.4. | Mælt verður til, at stjórnin og nevndin áseta eina mannagongd, har nevndarformaðurin og forstjórin við formligari samrøðu meta um sítt samstarv, og at úrslitið av metingini verður lagt fyri nevndina. | **Felagið fylgir ikki**<br><br>Stjórnin og nevndin hava ikki ásett eina formliga mannagongd, men árlig samrøða verður hildin í sambandi við metingina av stjórnini, smb. pkt. 3.5.3. |

## 4. SAMSÝNING HJÁ LEIÐSLUNI

### 4.1. FORMUR OG INNIHALD Í LØNARPOLITIKKINUM

| | | |
|---|---|---|
| 4.1.1. | Mælt verður til, at nevndin ger ein greiðan og einfaldan lønarpolitikk fyri nevnd og stjórn, sum hevur<br>• eina nágreiniliga frágreiðing af samsýningarlutunum, sum eru í samsýningini til nevnd og stjórn,<br>• eina grundgeving fyri valinum av samsýningarlutunum, og<br>• ein frágreiðing av fyritreytunum, sum eru grundarlagið í javnváganum millum samsýningarlutirnar<br>Lønarpolitikkurin skal góðkennast á aðalfundinum og almannakunngerast á heimasíðu felagsins. | **Felagið fylgir**<br><br>Bankin fylgir tilráðingini. |
| 4.1.2. | Mælt verður til, um lønarpolitikkurin hevur skiftiligar lønarlutir, at tað verða<br>• ásett mark fyri teimum skiftiligu lønarlutunum av samlaðu samsýningini,<br>• tryggjað ein hóskandi og javnvigað samanseting millum leiðslusamsýning, væntandi váðar og virðisskapanina fyri partaeigararnar yvir styttri og longri tíðarskeið,<br>• greidleiki um, hvussu úrslit verða máld í teimum skiftiligu lønarlutunum,<br>• fyritreytir, sum tryggjað, at heil ella lutvís samansparing av einum skiftiligum lønarluti í einum samsýningaravtalu fevnir um eira enn eitt kalendaraár, og<br>• gjørd avtala, sum gevur felagnum rætt til í heilt serligum førum at krevja fulla ella lutvísa afturgjalding av skiftiliga lønarlutinum, sum er útgoldin eftir grundarlagi, sum aftaná kunnu skjalprógvast at vera skeivar. | **Felagið fylgir**<br><br>Lønarpolitikkurin innheldur ikki skiftiligar lønarlutir. |

| | | |
|---|---|---|
| 4.1.3. | Mælt verður til, at nevndarlimir ikki verða løntir við partabrævaoptiónum ella tekningsoptiónum. | **Felagið fylgir**<br><br>Nevndarlimir í felagnum verða samsýntir við føstum samsýningum. |
| 4.1.4. | Mælt verður til, at um partabrævatengd samsýning verður brúkt, skulu skipanirnar vera revolverandi, tvs. tillutast skeiðbundið og skulu hava eina gildistíð upp á í minsta lagi 3 ár eftir tillutan. | **Felagið fylgir**<br><br>Partabrævatengd samsýning verður ikki nýtt í Eik Banka. |
| 4.1.5. | Mælt verður til, at avtalur um fráfaringarsamsýning í mesta lagi hava eitt virði, sum svarar til samsýningina tvey tey seinastu árini. | **Felagið fylgir**<br><br>Longsta fráfaringarsamsýning er til stjórn og er hendan 24 mánaðir. |

## 4.2. UPPLÝSING UM LØNARPOLITIKKIN

| | | |
|---|---|---|
| 4.2.1. | Mælt verður til, at lønarpolitikkurin hjá felagnum og hvussu hesin verður hildin, skal greiðast frá og grundgevast í formansfrágreiðingini á aðalfundi felagsins. | **Felagið fylgir**<br><br>Bankir fylgir tilráðingini. |
| 4.2.2. | Mælt verður til, at partaeigararnir á aðalfundinum góðkenna uppskot til samsýning til nevndina fyri inniverandi roknskaparár. | **Felagið fylgir**<br><br>Bankir fylgir tilráðingini. |
| 4.2.3. | Mælt verður til, at tað verður upplýst í ársfrásøgnini um samlaðu samsýningina, hvør einstakur nevndarlimur og stjórnin fær frá felagnum og øðrum feløgum í samtakinum, undir hesum upplýsir týðandi innihald í varðveitingar- og fráfaringarskipanum, og at greitt verður frá samanhanginum við lønarpolitikkin. | **Felagið fylgir**<br><br>Ársfrásøgnin hjá felagnum hevur eina notu, sum nágreiniliga upplýsir samsýningarnar hjá nevnd og stjórn. |

# 5. GER AV ROKNSKAPI, VÁÐASTÝRING OG GRANNSKOÐAN

## 5.1. EYÐMERKING AV VÁÐUM OG OPINLEIKI UM FLEIRI VIÐKOMANDI UPPLÝSINGAR

| | | |
|---|---|---|
| 5.1.1. | Mælt verður til, at nevndin tekur støðu til og í leiðslufrágreiðingini greiðir frá teimum týðandi strategisku og handilsligu váðunum, váðum í sambandi við ger av roknskapi, umframt váðastýringini hjá felagnum. | **Felagið fylgir**<br><br>Sum fíggjarlig fyritøka hevur felagið eina víðfevnda váðafrágreiðing um øll viðkomandi váðasløg, íroknað teir váðarnir, sum tilmælini nevna.<br><br>Meira kann lesast um váðarnar í sambandi við ger av roknskapi undir parti 2 í hesari frágreiðingini. Tað er eisini greitt frá váðastýring og týðandi strategisku og handilsligu váðarnir undir parti 3 í hesari frágreiðing. |

## 5.2. WHISTLEBLOWER-SKIPAN

| | | |
|---|---|---|
| 5.2.1. | Mælt verður til, at nevndin avger, hvørt ein whistleblower-skipan skal setast í verk, við tí í hyggju at geva møguleika til eina hóskandi frágreiðing, sum skal vera í trúnaði, um álvarslig misbrot ella um illgruni er um hetta. | **Felagið fylgir**<br><br>Tað er ikki lógarkrav at seta innanhýsis skipan í verk, sum er. Starvsfólkini í Eik Banka hava tó møguleika í trúnaði at boða Fíggjareftirlitinum frá misbrotum ella illgruna um misbrot gjøgnum eina trygga skipan á heimasíðuni hjá Fíggjareftirlitinum. Starvsólkini í Eik Banka eru kunnaði um hendan møguleikan. Eik Banki metir, at hetta er nøktandi. |

## 5.3. SAMBAND VIÐ GRANNSKOÐARA

| | | |
|---|---|---|
| 5.3.1. | Mælt verður til, at nevndin tryggjar eitt regluligt samskifti millum grannskoðara og nevnd, undir hesum at nevndin og grannskoðanarbólkurin í minsta lagi árliga møtir grannskoðaranum, har stjórnin ikki er tilstaðar. Samsvarandi er galdandi fyri innanhýsis grannskoðara, um slíkur er. | **Felagið fylgir**<br><br>Nevnd bankans mannar eisini grannskoðanarnevndina.<br><br>Nevndin/grannskoðanarnevndin hittir innanhýsis og uttanhýsis grannskoðanina minst einaferð árliga uttan, at stjórnin er hjástødd. |
| 5.3.2. | Mælt verður til, at grannskoðaraavtalan og samsýning til grannskoðara verður avtalað millum nevndina og grannskoðara við støði í tilmæli frá grannskoðarabólkinum. | **Felagið fylgir**<br><br>Nevnd bankans mannar eisini grannskoðanarnevndina. Samsýningin til uttanhýsis grannskoðanina verður avtalað millum nevndina og grannskoðaran. |

# 2. PARTUR

## TILRÁÐINGARNAR FRÁ FINANSRÁÐNUM

Finansráðið hevur gjørt eitt leiðsluhandrit við tilráðingum til limir sínar. Tilráðingarnar hjá Finansráðnum eru meiri víðfevnandi enn lógarkrøvini og tilráðingarnar frá"Komitéen for god Selskabsledelse".

Endamálið við tilráðingunum er at fáa limirnar í Finansráðnum at taka støðu og viðgera týðandi evni innan leiðslu, og at skapa størri opinleika um leiðslukarmarnar innan fíggjarheimin og harvið økja um áliti á bankageiran.

Sum limur í Finansráðnum hevur Eik Banki avgjørt at greiða frá sínari støðutakan til tilráðingarnar frá Finansráðnum.

| TILRÁÐINGAR | | |
|---|---|---|
| 1. | Mælt verður til, at limirnir í Finansráðnum taka støðu til øll tilmælini frá "Komitéen for god selskabsledelse". | Felagið fylgir<br><br>Er greitt frá í parti A í hesari frágreiðing. |
| 2. | Mælt verður til, at limirnir í Finansráðnum gera og almannakunngera eina atferðarlóg (code of conduct), sum greiðir frá virðisgrundarlagnum hjá felagnum og ynskta atferð í rakstri og leiðslu hjá felagnum. | Felagið fylgir ikki<br><br>Tilráðingin verður ikki fylgd. Bankin metir tó, at almenningurin í síni heild í nóg stóran mun fær kunnleika til virðisgrundarlag bankans og tann atburð, ið ynsktur verður, viðvíkjandi rakstri og leiðslu bankans gjøgnum dagliga virksemi bankans. Harafturat kemur viðisgrundarlag bankans og atburður til sjóndar í ársfrásøgn bankans, ið er at finna á heimasíðuni. |
| 3. | Mælt verður til, at limirnir í Finansráðnum brúka eina gjølliga lýsta og skipaða tilgongd í sambandi við útvegan av valevnum til nevnd og møguliga gera nýtslu av uttanhýsis førleikum. | Felagið fylgir ikki<br><br>Tilráðingin verður ikki fylgd. Í felagnum eru tveir partaeigarar. Sambært eigaraavtalu hevur TF Holding rætt at skjóta 4 nevndarlimir upp og Finansel Stabilitet 1 nevndarlim. Partaeigaranir skjóta í felag 1 nevndarlim upp, ið skal vera formaður. |
| 4. | Mælt verður til, at limirnir í Finansráðnum, um viðtøkurnar hava ásetingar um at nevndarlimir einans skulu veljast innanfyri avmarkaðan bólk av persónum, greiðir frá grundgevingunum fyri hesum avmarkingum. | Felagið fylgir<br><br>Viðtøkurnar innihalda ikki eina slíka avmarking. |
| 5. | Mælt verður til, at nevndarlimir skjótast gjørligt og í seinasta lagi 6 mánaðar eftir nevndarval byrja eina útbúgvingartilgongd í rakstri av banka, um nevndarlimurin ikki longu áðrenn hevur dagførdar og serligar bankaførleikar. Tilgongdin skal taka støði í støddini á felagnum, handilsmodell og torskilnaði. | Felagið fylgir<br><br>Nevndin heldur leypandi eyga við tørvinum á útbúgving av nevndarlimunum. Nevndin metir eisini regluliga um egna vitan og royndir til tess at tryggja, at nevndin til hvørja tíð hevur neyðugar førleikar á teimum økjum, sum krevjast samsvarandi virkiskørmunum. Viðtøkurnar hjá bankanum eru tøkar á heimasíðu felagsins. |

| | | |
|---|---|---|
| 6. | Mælt verður til, at at nevndarlimirnir fáa áhaldandi førleikamenning, um tað er viðkomandi fyri nevndararbeiði. Evni og vavi skal vera tillagað støddini á felagnum, handilsmodell og torskilnaði. | **Felagið fylgir**<br><br>Nevndarlimir verða leypandi førleikamentir, so at nevndin til hvørja tíð hevur ta neyðugu vitanina og royndirnar samsvarandi virkiskørmunum hjá bankanum. |
| 7. | Mælt verður til, at hvør einstakur nevndarlimur árliga metir um sítt arbeiði í nevndini. Nevndarlimurin skal, sum liður í metingini, fylla út eitt metingaroyðiblað, sum viðvíkur øki bæði innan leiðslu og bankatøkni. | **Felagið fylgir**<br><br>Nevndin eftirmetir minst eina ferð árliga um, hvørt førleikarnir hjá einstøku nevndarlimunum fevna um økini innan fyri virkiskarmarnar hjá bankanum. Til endamálið verður m. a. eitt oyðiblað yvir egnar førleikar á eini røð av úrvaldum økjum brúkt, hjá tí einstaka nevndarliminum at fylla út. |
| 8. | Mælt verður til, at viðkomandi fakserfrøðingar verða tiknir við í arbeiðinum hjá nevndini, undir hesum luttøku á nevndarfundum við serliga torskildum málum. | **Felagið fylgir**<br><br>Um og í tann mun tørvur er á tí verða fakserfrøðingar, innanhýsis sum uttanhýsis, tiknir við í nevndararbeiði í serligum torskildum málum. |
| 9. | Mælt verður til, at samstarvi millum stjórn og nevnd verður viðgjørt í minsta lagi árliga. Stjórnin skal ikki vera tilstaðar undir hesari viðgerð. | **Felagið fylgir**<br><br>Nevndin viðger samstarvið millum nevnd og stjórn einaferð árliga uttan at stjórnin er hjástødd. |
| 10. | Mælt verður til, at á heimasíðuni hjá limunum í Finansráðnum ella á samsvarandi hátt verður almannakunngjørt eitt yvirlit av luttøku hjá nevndarlimum á nevndarfundum og fundum í undirnevndum. | **Felagið fylgir ikki**<br><br>Við bert tveimum partaeigarum metir bankin ikki at hendan tilráðingin er viðkomandi fyri Eik Banka. |
| 11. | Mælt verður til, at limirnir í Finansráðnum taka støðu til ásetingarnar um loft av leiðslupostum ásett í lóg um fíggjarligt virksemi. | **Felagið fylgir lutvíst**<br><br>Henda áseting í lóg um fíggjarligt virksemi er ikki galdandi í Føroyum. Tá ásetingin, ið er galdandi fyri SIFI bankar, er komin í gildi í Føroyum, verður hon galdandi fyri bankan, ið er væntandi verður tilnevndur SIFI banki. Nevndin og hvør einstakur nevndarlimur eru tilvitað um týdningin av, at teir einstøku nevndarlimirnir skulu hava eina støðu til, um teir hava ta neyðugu tíðina at røkja starvið sum nevndarlimur á ein fyri bankan nøktandi hátt. Nevndin hevur kunnleika til, hvørji onnur nevndarstørv o. a. m. , nevndarlimirnir røkja. Hesar upplýsingar finnast á heimasíðu bankans. |

| | | |
|---|---|---|
| 12. | Mælt verður til, at limirnir í Finansráðnum hava eyga við leiklutinum hjá uttanhýsis grannskoðara og dygdini av arbeiðinum, sum verður gjørt. Limirnir skulu m.a. seta krøv til samansetingina av teimum liðum, sum uttanhýsis grannskoðari brúkar, so tryggjast kann, at í minsta lagi tveir royndir grannskoðarar eru á liðnum við ískoytis førleikaøkjum. Fyri at vera royndur grannskoðari, skal viðkomandi hava gjøgnumført eftirútbúgving málrættað peningastovnsøkinum, umframt luttikið í grannskoðan av banka, sparikassa ella "andelskasse" í minsta lagi 3 ár. | **Felagið fylgir**<br><br>Sambært arbeiðssetninginum hjá grannskoðanarnevndini skal grannskoðanarnevndin m. a. meta um førleikan og dygdina av arbeiðnum hjá uttanhýsis grannskoðanini, og um val og afturval av uttanhýsis grannskoðanini. Grannskoðanarnevndin hevur eftirlit við um uttanhýsis grannskoðanin er óheft.<br><br>Bankin verður grannskoðaður av viðurkendum grannskoðaravirki, ið lýkur settu krøvini. |

**Eik Banki P/F**
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
www.eik.fo